## Celtic-áskoðari doyði

Um hálvgum ellivu tíðina í gjárkvøldið doyði ein Celtic-áskoðari undan seinnu áttandeilsfinaluni í Champions League ímillum AC Milan og Celtic. Maðurin skuldi fara yvir um vegin í italska stórbýnum Milano, tá hann bleiv yvirkoyrdur av einum taxabili. Hetta sigur bretska konsulatið í Milano. Sum skilst, so var talan um ein 37 ára gamlan skota. Annars endaði fyrri dysturin millum Celtic og Milan 0-0, og tí er dysturin púra opin undan seinnu áttandeilsfinaluni.

## Slagsmál í Valencia

Tað er synd at siga, at dysturin millum Valencia og Inter var eitt stórt fótbóltsupplivilsi. Men dramatikkurin, sum manglaði í sjálvum dystinum, hann kom so sanniliga til sjóndar eftir dystin. Her bleiv eitt stórt slagsmál mitt á vøllinum, og hetta endaði við, at útskiftarin hjá Valencia, David Navarro, kom rennandi inn á vøllin og breyt nøsini hjá Nicolas Burdisso. Slagsmálið helt fram í eina góða løtu, bæði á vøllinum og eftir at spælararnir vóru farnir av vøllinum. Bæði feløgini kunnu vænta sær bøtur og leikbann, tá UEFA hevur sæð upptøkurnar.

# TB gjørdist stóri

**Tey yngru sluppu rættiliga at royna seg í flogbólti farna vikuskiftið, tá FM var á skránni fyri yngru deildirnar. Her gjørdist TB heilt stóri vinnarin**



TB fór avstað við øllum hjá gentum 12 ár. TB a og TB b møttust í finaluni, og her fór a-liðið avstað við gullinum. Eisini bronsan endaði á Tvøroyri, tí TB c vann nevniliga bronsuheiðursmerki.



Mjølnir vann kappingini hjá kvinnuunglingum. Tær vunnu finaluna ímót

FLOGBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Farna vikuskiftið var stórt flogbóltstiltak á skránni, tá yngru deildirnar skuldu kappast um føroyameistaraheitið. Innleiðandi bólkarnir blivu spældir í Gundadalshøllini, Hoyvíkshøllini og høllini í Kollafirði tíðliga leygardagin, meðan finalurnar hjá teimum yngstu vóru á skránni seinni leygardagin.

Sunnudagin var so stórt finalutiltak í Hoyvíkshøllini, tá finalurnar hjá teimum 14 ára gomlu og hjá unglingunum vóru á skránni. Hesir dystir blivu spældir á taraflex-gólvinum hjá Flogbóltssambandinum, og tí var hetta helst ein heilt serlig løtu hjá teimum, sum ikki hava royndt at spæla á slíkum gólvi áður.

### TB vann alt

Kappingin hjá teimum yngstu gentunum, gentum 10, var ikki á skránni hetta vikuskiftið, og tí vóru tað bert tríggir gentualdursbólkur, sum kappaðust farna vikuskiftið.

Kappingin hjá gentum 12 var tann einasta gentukappingin, sum bleiv avgjørd leygardagin- Her var slett eingin ivi um, hvat var tað sterkasta felagið. TB hevur víst í onkrari kapping fyrr í ár, at tað eigur nógvar góðar spælarar í hesum aldursbólkinum, og aftur hesaferð vísti felagið av Tvøroyri, at tað er einaráðandi í hesum aldri. TB fór nevniliga avstað við øllum heiðursmerkjunum, og í finaluni møttust TB a og TB b. Hen- da dystin vann TB a, og sostatt fóru tær avstað við gullheiðursmerkjunum. Silvur fór til TB b, meðan TB c vann bronsuheiðursmerkini. Eitt sera flott úrslit av TB í hesum aldri.

### Dráttur og TB sigraðu hjá dreingjunum

Hjá dreingjunum blivu tvær kappingar avgjørdar leygardagin, og hetta vóru sjálvsagt kappingarnar í teimum yngstu aldursbólkunum, dreingir 10 ár og dreingir 12 ár.

Hjá teimum 10 ára gomlu vístu vágafeløgini seg at vera sterkast. Dráttur er serliga kent fyri flogbóltin á kvinnusíðuni, men teir yngstu dreingirnir hjá felagnum duga eisini. Teir megnaðu nevniliga at spæla seg í finaluna, og her var mótstøðuliðið hitt vágaliðið, SÍ. Dráttur dró longra stráið í hesum dystinum, og sostatt vunnu teir gull frammanfyri SÍ, sum fekk silvur. Bronsuheiðursmerkini fóru til Fleyr a.

TB er ikki bara væl fyri hjá teimum 12 ára gomlu gentunum, tí dreingirnir vístu leygardagin, at dugur eisini er í teimum. Teir komu allan vegin til finaluna, har mótstøðuliðið var Mjølnir úr Klaksvík. Her vísti TB seg at vera tað sterkara liðið, og sostatt tryggjaði TB sær sítt næsta gullheiðursmerki við sigrinum hjá dreingjum 12. Mjølnir fekk silvurheiðursmerki, meðan bronsuheiðursmerkini fóru til Sørvágs.

### Stórt finalutiltak

Sunnudagin kom so dagurin, tá ið stóra finalutiltaki var á skránni í Hoyvíkshøllini. Her skuldu fýra finaludystir spælast, og tað, sum var sera spennandi hjá leikarunum og helst eisini eitt sindur øðrvísi, var, at teir skuldu spæla finaludystirnar á taraflex-gólvinum hjá Flogbóltssambandinum. Magnus Tausen, formaður í flogbóltssambandinum lat væl at finaludegnum.

- Sunnudagurin eydnaðist sera væl. Vit byrjaðu tíðliga á morgni við finaluni hjá dreingjum 14 ár, og tá vóru ikki so nógvir áskoðarar, tí hetta var jú tíðliga uppá dagin. Seinni um dagin vóru nógvir áskoðarar til dystirnar, og serliga gott lív var í til finalurnar hjá gentum 14 og kvinnuunglingum.

Magnus helt eisini, at spælarar vóru glaðir fyri at spæla á taraflexgólvinum.

- Eg eri heilt vísur í, at spælararnir vóru glaðir fyri at spæla á taraflex-gólvinum. Hetta er ein øðrvísi uppliving hjá teimum yngru leikarunum, sum teir virkiliga síggja fram til.

Flogbóltssambandið hevði eisini syrgt fyri, at góðir dómarar vóru til finaludystirnar, og m.a. dømdi okkara altjóða dómari, Jan Hentze, tvær tær fyrstu finalurnar.

### TB fekk triðja gullið

Fyrsti dysturin, sum var á skránni sunnudagin, var finalan hjá dreingjum 14 ár.

#### VINNARAR GENTUR

**Gentur 12:**
TBa
TBb
TBc

**Gentur 14:**
Fleyr
KÍF
Mjølnir

**Kvinnuunglingar:**
Mjølnir
SÍ
Dráttur

#### VINNARAR DREINGIR

**Dreingir 10:**
Dráttur
SÍ
Fleyr a

**Dreingir 12:**
TB
Mjølnir
SÍ

**Dreingir 14:**
TB
ÍF
TBb

**Mansunglingar:**
SÍ
Nøvan
Mjølnir